




## Hava gallarí í Tversted

Kim Tornby, sum býr saman við føroyskari kvinnu, er framleiðsluleiðari í fyritøkuni Elektromarine í Skagen. Men hann eigur eisini gallarí í Tversted, stutt norðanfyri Hirtshals, har eitt nú føroyingar hava sýnt fram sína list.

Sosialurin hitti Kim á bryggjuni í Skagen í síðstu viku.

**Hvat tilknýti hevur tú til Føroyar?**
– Eg livi saman við føroysku kvinnuni, Hannelin á Hálvmørk, og vit hava gallarí í Tversted, har vit búgva. Fleiri føroysk listafólk hava sýnt fram her hjá okkum.

**Kanst tú nevna onkur føroysk listafólk, sum hava sýnt fram í Galleri Tornby?**
– Vit hava eitt nú havt Øssur Mohr, Hilmar Højgaard – og vit hava eisini havt vitjan av Eivør Pálsdóttir.

Kim er annars framleiðsluleiðari í fyritøkuni, Elektromarine í Skagen.

**Hvat ger Elektromarine?**
– Vit gera serliga el-talvur og stýringstalvur til fiski- og frálandavinnuna, og vit eru eini 50 fólk í starvi hjá fyritøkuni, sigur Kim Tornby.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vodafone hevði tvær milliónir í avlopi

**Árið 2010 hjá Vodafone royndist heldur frægari enn 2009, og avlopið í fjør var 2 mió.kr. fyri skatt. Botnlinjan er batnað 3,1 mió. kr. Samlaða marknaðarstøðan hjá felagnum er so at siga óbroytt í 2010**




*Vodafone spardi útreiðslur í 2010, og tað hevði við sær betri úrslit*

Nú eru 10 ár eru gingin, síðani Vodafone kom á marknaðin við sínum tænastum. 9. apríl 2001 bjóðaði felagið fyrstu ferð fastnet tænastur til føroyska brúkaran. 10 ár seinni kann felagið gera status við einum marknaðarparti uppá millum 25% og 30% av samlaða føroyska fjarskiftismarknaðinum.

- Hesa høvuðsgongd fegnast vit í Vodafone um, og vit eru eisini rímiliga nøgd við, at seinasta árið hevur roynst betri enn kreppuárið 2009, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri í Vodafone.

Roknskapurin fyri 2010 vísir eitt yvirskot á 2 mió.kr. fyri skatt í 2010, samanborið við eitt hall uppá 1,1 mió.kr. fyri skatt í 2009. Samlaða marknaðarstøðan hjá felagnum er so at siga óbroytt frá 2009 til 2010.

Høvuðsorsøkin til yvirskotið er minni útreiðslur, tí umsetningurin stóð meira ella minni í stað frá 2009 til 2010.

Rakstraríkskoytið (EBITDA) øktist úr 11,3 mió. kr. uppí 12,5 mió.kr. Úrslitið av primera rakstrinum (EBIT) var eitt yvirskot uppá 3,5 krónur. Hetta er 2,8 mió. kr. hægri enn í 2009. Samlaða sølan stóð í stað á 92 mió.kr. samanborið við 2009.

- Tillagingar í rakstrinum halda fram í 2011 við tí fyri eyga at fáa ein betri javnvág millum inntøkur og útreiðslur, so íløgur framhaldandi kunnu gerast í framtíðar fjarskifti í Føroyum, sigur Bjarni A. Bjarnason.

Felagið metir eisini, at tað er alneyðugt, at myndugleikarnir dagføra fjarskiftisreglurnar til nútímans evropeiskar reglur, og at almenna netið verður lagt í eitt sjálvstøðugt partafelag. Eisini er alneyðugt at kappingareftirlitið verður styrkt til frama fyri brúkaran og

## Í MORGIN




11-12 m/s 11-12 m/s

Sólarglottar, ælaveður og útsynningur 9 m/s. Hitin 6 stig.

## SUNNUDAGIN




11-12 m/s 11-12 m/s

Sólarglottar, turt fyri tað mesta og útsynningur sunnar. Hitin 8 stig.

## MÁNADAGIN




7-10 m/s 7-10 m/s

Yvirhøvur sól, turt og útsynningur. Hitin 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst við Danmarkarsundið flytur seg ikki og dýpist. Lýggj og slavin luft rekur yvir Føroyar av útsynningi.




Í morgin kemur ein kuldabrúgv inn yvir Føroyar og hevur ælaveður við sær. Komandi dagarnar streymar lýggj luft til Føroyar av suðri.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

11. apríl Fyrra kvarter
17. apríl Mánin næstur jørðini
18. apríl Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. apr | 07:17 | 19:45 | 06:17 | 18:45 | 06:32 | 19:00 | 09:17 | 21:45 | 10:17 | 22:45 | 05:32 | 18:00 | 04:32 | 17:00 | 07:32 | 20:00 | 08:32 | 21:00 | 07:02 | 19:30 | 08:17 | 20:45 |
| 19. apr | 08:13 | 20:42 | 07:13 | 19:42 | 07:28 | 19:57 | 10:13 | 22:42 | 11:13 | 23:42 | 06:28 | 18:57 | 05:28 | 17:57 | 08:28 | 20:57 | 09:28 | 21:57 | 07:58 | 20:27 | 09:13 | 21:42 |
| 20. apr | 09:11 | 21:40 | 08:11 | 20:40 | 08:26 | 20:55 | 11:11 | 23:40 | - | 12:11 | 07:26 | 19:55 | 06:26 | 18:55 | 09:26 | 21:55 | 10:26 | 22:55 | 08:56 | 21:25 | 10:11 | 22:40 |
| 21. apr | 10:10 | 22:38 | 09:10 | 21:38 | 09:25 | 21:53 | - | 12:10 | 00:40 | 13:10 | 08:25 | 20:53 | 07:25 | 19:53 | 10:25 | 22:53 | 11:25 | 23:53 | 09:55 | 22:23 | 11:10 | 23:38 |
| 22. apr | 11:06 | 23:05 | 10:06 | 22:05 | 10:21 | 22:20 | 00:38 | 13:06 | 01:38 | 14:06 | 09:21 | 21:20 | 08:21 | 20:20 | 11:21 | 23:20 | - | 12:21 | 10:51 | 22:50 | - | 12:06 |